*Tað munnu vera fá – um yvirhøvur nakar núlivandi! – sum hava gingið oftari enn eg upp um fjallið millum Klaksvík og Norðtoftir*

nú bíðaði onnur farleiðin.

Tey plagdu at gista í einum húsum, sum í hugaheiminum hjá tí lítla Sonna, bar heitið »Reyða Hús«, áðrenn farið varð umborð á bátin ið skuldi føra tey til Norðtoftir. Og hetta kundi mangan gerast ein long og strævin ferð.

- Tað mest vanliga var at fara allan vegin norður um Múlan. So tú kanst ætla, at tað tók sína tíð at koma fram, sigur hann við einum brosi.

## Fjós við vatni

Hyggur ein eftir fólkatalinum á Norðtoftum tey seinastu árini, so kann ein skjótt staðfesta at her hevur verið stór afturgongd.

Fyri meiri enn 20 árum síðani búðu 8 mannfólk og 3 konufólk í bygdini, meðan síðani er talið minkað javnt og samt, og er í dag farið niður um helvtina av tí, sum tað var tá: Sambært seinastu hagtølunum búðu einans 5 fólk á Norðtoftum – 3 mannfólk og 2 konufólk.

Í húsunum hjá Sonna vóru tey fyrr í tíðini fýra fólk – omma hansara og sum var ógift, ein hálvur pápabeiggi ið æt Sofus og tveir ommubeiggjar sum itu Guttorm og Jóannes. Hesin seinast nevndi tók festið eftir pápa sín, sum vanliga varð nevndur Múla-Poul.

Tað var eisini í hesi tíðini at teir avgjørdu at byggjast skuldi eitt fjós úr gróti. Sovítt sum Sonni veit, var hetta helst tað fyrsta fjósið yvirhøvur, sum fekk vatn lagt inn.

- Hetta fjósið var einar 12 metrar langt, og kanska einar tríggjar til hálvan fjórða metur breitt. Tað sjáldsama við hesum var, at áin rann gjøgnum hetta fjósið.

- Hetta var jú sera praktiskt, tí so sluppu teir undan at fara aðrar staðir eftir vatninum, greiðir hann frá.

## Kúgvin vendi øvugt

Sum so mangir aðrir menn tá í tíðini, so var pápi Sonna nógv til skips. Hann var skipari – fyri ikki at siga: rokskipari – umborð á »Verdandi«.

- Esmar Fuglø og hann, - teir vóru vinmenn og høvdu verið til skips saman. Esmar segði mær einaferð, at hann kendi ongan erligari mann enn "Hjalmar á Norðtoftum".

- Ja, hann fortaldi eisini, at pápi var sera ágrýtin á sjónum og sannur rokmaður: Um menn vóru tørnaðir inn og hann bar við fisk, so kundi hann tveita tann fyrsta fiskin sum kom á dekkið niður í lugarið.

- Á henda hátt vildi hann bara purra manningina út og siga teimum frá, at fiskur var undir skipinum. So hann luskaði sær ikki nakrar fiskar, sum hinir ikki skuldu vita av, greiðir Sonni frá.

Sonni var ikki meiri enn sjey ára gamal, tá pápin doyði eftir at hava verið sjúkur í tvey ár. Hann minnist enn ein sunnudag, tá hann mundi vera um fimm ára gamal.

- Slíkar dagar var altíð lisin lestur. Og tá, eins og í dag, sótu dreingirnir mangan óstillir eina slíka løtu, har vit sótu úti í køkinum, tí vit ikki sluppu inn í stovuna, har hini sótu.

- Eg var farin upp á borðið at sita, og nú einaferð hyggi eg út gjøgnum vindeygað og fái tá eyga á eina flekkuta kúgv sum stóð á beiti beint omanfyri húsini. Tað løgna var tað, at beinini vendu beint upp í loft, tí hon var dottin um rygg niður í eina veit, greiðir Sonni brosandi frá.

Hjá honum var ikki annað at gera enn at gloyma bæði tíð, stað, halgu og lestur, og hann skar í róp: - Kúgvin vendir uppeftir! Kúgvin vendir uppeftir!

- Tá góvust tey at lesa lestur og fóru rennandi út fyri dyr at bjarga hesi neyðars kúgv. Og soleiðis varð hon bjargað, minnist Sonni afturá.

Men um lesturin varð tikin uppaftur, verður einki sagt um!

# 1 tíma og 32 minuttir um fjallið

**Hóast Sonna Frederiksen altíð hevur dámað væl her á Norðtoftum, so kom hann kortini at vaksa upp sum havnardrongur**

Pápi hansara gekk á skiparaskúla í Havn og hitti har konu sína, og bygdi sær hús uppi í Brekkugøtu í 1933. Hann doyði í 1942, so tey fingu ikki langa tíð saman í hesum nýbygdu sethúsunum.

Sonni var eitt skifti í 50'unum úti og sigldi kring heimin, men hann kom kortini at fáa lívsstarv sítt á landi í heilsøluni hjá Poul Hansen, her hann var í samfull 50 ár. Men hugurin at vitja aftur á Norðtoftum var allatíðina til staðar.

- Ja, eg má bara siga sum er, at tað munnu vera fá – um yvirhøvur nakar núlivandi! – sum hava gingið oftari enn eg upp um fjallið millum Klaksvík og Norðtoftir, sigur hann við einum brosi, men tó uttan at reypa sær av hesum.

Eitt dømi um hesi viðurskifti var einaferð, teir skuldu fara eftir eini gimbur við einum lambi og sum gekk í Tjørnudali, nakað væl sunnanfyri Norðtoftir. Sonni vildi so fegin at teir skuldu taka lambið áðrenn mikkjalsmessu, sum er 29. september.

- Hetta hevur helst verið ein leygardag fyrst í september mánaði, at eg fór umborð á Pride sum legði frá bryggju í Havn klokkan tvey.

- Eg havi havt mangan ringan túrin upp um fjallið til Norðtoftir í bæði toku, vindi, regni og myrkri. Men hesin túrurin bleiv heilt øðrvísi enn hinir, greiðir Sonni frá. Nakrar tímar seinni legði Pride so at í Klaksvík og hann legði til fjals beinanvegin.

## Morgunmaður

Frammanundan hevði Sonni tosað við røktingarmannin Árna, um teir ikki skuldu fara eftir hesum lambinum morgunin eftir – tað er: sunnumorgunin. Hann var við uppá tað beinanvegin, og síðani hildu teir avstað.

Teir vóru hepnir og komu skjótt fram á lambið og ærina. Teir fingu ein enda um lambið, sum soleiðis fór rennandi allan vegin heim í bygdina aftur.

- Eg segði so við Sofus, at vit áttu bara at flett lambið beinanvegin, men hann segði nei: »Sunnudag fletta vit einki lamb!«. So tað varð ikki gjørt henda dagin.

- Men eg hevði kortini sett í meg, at lambið skuldi flettast áðrenn eg fór til Havnar aftur, sigur Sonni við einum brosi.

Hann gjørdi ikki mætari enn at fara árla á føtur henda mánamorgunin. Klokkan mundi neyvan vera meiri enn trý, tá hann var á fótum og byrjaði at fletta hetta góða lambið.

- Eg mátti gera skjótt av, tí Pride sigldi longu klokkan átta av Klaksvík. Tá alt hetta var ordnað fór eg til gongu upp um fjallið og var millum ferðafólkini til Havnar henda morgunin.

- Eg haldi, at eg var í Klaksvík einar 10 til 15 minuttir áðrenn hann legði frá landi. Og klokkan var farin beint av 10 var eg til arbeiðis aftur hjá Poul Hansen! So hetta var ein spennandi weekend, minnist Sonni afturá.

## Met um fjallið

At ganga soleiðis upp um fjallið millum Klaksvík og Norðtoftir er drúgvur teinur. Vanliga nýttu menn millum tveir og hálvan triðja tíma um túrin.

Men er ein í góðari venjing – ella í so góðari venjing sum Sonni var á yngri árum, kann tað gerast uppaftur skjótari. Hann spældi hesa tíðina hondbólt við KFUM og var í allar mátar sera væl fyri likamliga.

- Einaferð kom hugsanin til mín at vita, hvussu skjótt – ella stutt! – tað bar til at ganga henda teinin um fjallið. Og sum sagt, so gjørt!

Sonni hevði eina avtalu við Hans Jacob Joensen, vanliga nevndur kollfirðingurin, og sum hevði eitt pylsuvirki í Klaksvík, og hevði sagt honum, at hann var vælkomin at læna súkklu hansara fyri at spara tíð og soleiðis koma skjótari norður í Ánirnar, haðani leiðin upp um fjallið byrjaði.

- Eg tók so súkkluna, men fór fyrst inn á telefonstøðina í Klaksvík at siga frá, at eg var á veg norður. Eg súkklaði so norður til tey svørtu húsini í Ánunum, ið standa har enn í dag, tók súkkluna uppá nakkan og bar hana niðan um garðarnar. Síðani helt eg til fjals.

- Tá eg hugdi at klokkuni aftur, vóru einans farnir ein tími og 32 minuttir frá tí eg ringdi til Sofus og til eg segði góðan dag við Sofus á Norðtoftum. Men Sofus vildi ongatíð trúgva hesum, og hann bleiv við at siga, at hetta bar ikki til og at Sonni mátti hava steðgað í grannabygdini. Eingin kundi ganga sooo skjótt um fjallið.

- Og eg haldi, at hann, til sín doyggjandi dag, trúði at eg hevði ringt úr Árnafirði til Norðtoftir!



*Tað lá væl fyri hjá Sonna Frederiksen at ganga upp um fjallið millum Norðtoftir og Klaksvík. Ta einu ferðina gekk hann teinin eftir einans 92 minuttum! – Ja, einaferð var man í góðum formi, sigur 73 ára gamli maðurin*